# Seismisk innrás á



*Fiskivinnan eigur lívið í okkum. Nú royna seismikkskip at rudda slóð fyri eini oljuvinnu, so búskapurin kann fáa fleiri bein at standa á. Her Malene Østervold á Havnini og bíðar eftir líkindum*



*Skiparin á Malene Østervold valdi heldur at koma á Havnina at gera ymsar umvælingar enn at fara til Onglands. –Eg eri sera væl nøgdur við arbeiðið, sum Tórshavnar Skipasmiðja hevur gjørt*

**Ikki færri enn trý feløg gera í løtuni seismiskar kanningar á føroyska landgrunninum við tilsamans trimum skipum**

SEISMIKKUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Müller*

Skulu vit ganga eftir áhuganum fyri at gera seismiskar kanningar á føroyska landgrunninum, har ikki minni enn trý skip í løtuni skjóta seismikk á einum stórum øki, so má sigast, at vónirnar til at finna olju og gass í undirgrundini framvegis eru til steðar. Ja kanska entá góðar.

- Tað er gott fyri leitingina á landgrunninum, at fleiri feløg vilja gera seismiskar kanningar her, og hetta kann eisini vera sera gott fyri 3. útbjóðingina, sum verður seinni í ár sigur Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi. Hann heldur, at tað nógva seismiska kanningarvirksemið í løtuni bendir á, at føroyska økið framvegis er áhugavert fyri oljufeløgini.

Meðan tvey av seismisku feløgunum gera sokallaðar "Spec" kanningar, tvs. kanningar, sum tey sjálvi gjalda fyri og síðani selja víðari til oljufeløgini ella sum onkur klientur, tvs. oljufelag, hevur goldið fyri men vil halda loyniligt, so ger triðja felagið eina bundna uppgávu fyri Chevron, Statoil, Dong og OMV, sum hava fingið tillutað loyvi bæði í føroyskum og bretskum øki, báðumegin markið. Talan er um seismikkskipið Malene Østervold, sum norska felagið Wavefield eigur. Skipið hevur ligið á Havnini í nakrar dagar og bíðað eftir betri veðri. Tað skal gera 2 D kanningar báðumegin markið.

Glen Reuter, geofysikari hjá Chevron er við skipinum og hevur til uppgávu at tryggja, at kanningarnar ganga eftir ætlan. Hann sigur, at talan er um sera týdningarmiklar kanningar, tí tær skulu vera grundarlagið undir komandi avgerðum hjá Chevron at fara undir at bora á føroyska landgrunninum komandi árini. Kanningarnar skulu vara í einar 10 dagar og brúka teir rættiliga framkomna útgerð. Skotið verður føroysku megin markið og síðani verður farið yvir á bretskt øki eisini. Hetta er nærhendis Rosebank oljukelduni, ið